# Nýtt flogfelag verður stovnað

**Leygardagin var kunnandi fundur fyri møguligar íleggjarar í nýggja flogfelagið, Faroe Jet, á Hotel Hafnia í Havn. Ætlanin er at byrja rutuflúgving millum Føroyar og Keypmannahavn 1. mars 2006**

NÝTT FLOGFELAG
*Anna V. Ellingsgaard*
anna@sosialurin.fo

Frá í vár komandi ár verður Atlantic Airways ikki longur einasta flogfelagið, ið fer at røkja rutuna millum Vágar og Keypmannahavn. Ein av komandi døgunum verður nýggja flogfelagið Faroe Jet stovnað.

## Kundin skal kunna velja

Nýggja felagið hevur longu 15 milliónir krónur í eginpeningi, men stigtakarnir ætla at fáa millum 22 og 25 mió kr, áðrenn byrjað verður, sigur Hans Meinhard á Høgabóli, ið er ein av stigtakarunum.

Í fyrsta umfari er ætlanin, at Faroe Jet fer undir rutuflúgving millum Vágar og Keypmannahavn 1. mars komandi ár. Byrjað verður við einum flogfari, og samráðingar eru í gongd við British Aerospace um at langtíðarleiga eitt RJ-100 flogfar, sum er sama slag sum tað nýggja hjá Atlantic Airways.

- Sum støðan er nú á flogferðsluøkinum, líkist hon mest einum monopoli. Kundin eigur at hava rætt at velja sjálvur, sigur Hans Meinhard á Høgabóli.

## Royndir menn

Tað eru tríggir veteranar í føroyskari flúgving, sum eru millum stigtakararnar til nýggja flogfelagið, Faroe Jet. Teir eru Hans Meinhard á Høgabóli, Jógvan (Egga) Simonsen og Mourits Joensen, sum allir vóru við til at byrja tyrluflúgving í Føroyum. Hans Meinhard á Høgabóli hevur verið flogskipari hjá Atlantsflog í nógv ár, meðan Mourits Joensen var tekniskur leiðari hjá Atlantsflog í fleiri ár. Jógvan Simonsen byrjaði tyrluflúgving og varð seinni leiðari á Tyrludeildini hjá Strandferðsluni.



*Nýggja flogfelagi Faroe Jet byrjar flúgvingina við einum RJ-10 flogfari, sum er sama slag sum tað nýggja hjá Atlantic Airways*



*Eftir nøkur megnar tøk í endaspurtinum eydnaðist tað Sambandsfarinum at leggja Miðørkina aftur um seg og vinna finaluna í politisku róðrarstafettini í SMS leygardagin*

*Mynd: Drekin.fo*

# Sambandsfarið sigraði

**Sambandsflokkurin við Kaj Leo Johannesen, Alfred Olsen og Annfinni Brekkstein, vann politisku róðrarstafettina í SMS**

POLITISKUR RÓÐUR
*Anna V. Ellingsgaard*

Hópur av fólki var samankomið at síggja landsins kosnu kapprógva í SMS. Róðurin var í sambandi við 20 ára føðingardagin hjá Róðrarfelagnum Knørri í Havn.

Allir flokkar vóru við, og eftir at hava vunnið sínar innleiðandi róðrar var greitt, at Sambandsfarið og Miðørkin við Álvi Kirke á odda komu í finaluna. Finalan gjørdist ógvuliga spennandi, men tá ið so Annfinn Brekkstein og Kaj Leo Johannesen tóku nøkur megnar tøk, orkaði Miðflokkurin ikki meira.

Eftir róðurin fingu bæði vinnarar og taparar gávur frá Róðrarfelagnum Knørri. Kaj Leo Johannesen vísti í røðu síni á, at hóast summi ítróttarfeløg ikki hava bestu umstøður, so kunnu tey vísa á framúr góð úrslit. Hetta eru Róðrarfelagið Knørrur og onnur smá feløg kring landið góð dømi um. Hann takkaði at enda fyri eitt gott og skemtiligt tiltak og ynskti Róðrarfelagnum Knørri blíðan byr framyvir.

